## DAGSINS MEINING

# Býurin og umhvørvi

Øll eru góð við ”ta Deiligu Havn”. Fólk flyta til Havnar og fólk stórtrívast í Havn. Flestu býráðini hava rikið ein heildarpolitikk - býi og fólki at frama. Eitt undantak er kanska býráðið seinasta valskeiðið. Nógv halda, at tá lá ikki heildarpolitikkurin fremst. Byggimeistarar fingu eftir øllum at døma fríari rásarúm. Almennar byggisamtyktir vórðu broyttar. Í summum førum ikki heildini at frama.

Í vikuni frættist, at ein meiriluti í fíggjarnevndini mælir býráðnum til at keypa eini gomul hús við Tinghúsvegin, húsini hjá Degn, landsskjalavørði, fyri fimm milliónir. Hetta verður m.a. gjørt fyri at verja umhvørvið í Miðbýnum, sigur borgarstjórin. Hesum hevur hann rætt í út frá einum sjónarmiði at verja umhvørvið, verja nakað av tí, sum er gamalt og goyma nakað av tí hugna, sum eyðkennir gomlu Havnina.

Hinvegin mælir ein minniluti - umboð fyri gamla meirilutan - til at geva byggiloyvi, sum byggisamtyktin loyvir. Tekur býráðið undir við hesum tilmælinum, fáa vit ein skrivstovubygning úr betongi, stáli og glasi. Óivað vakur, og sum óivað hevði riggað væl í einum umhvørvi við havið ella í einum umhvørvi við skrivstovubygningum og tílíkum. Men í ”gomlu Havnini”? Nnnneiii!

Flestu havnarfólk - og fólk av bygd - halda, at umhvørvið við Vaglið skal varðveitast. Hetta er nærum hjarta í Føroyum. Og á hesum bletti eigur ikki tilvildin at ráða. Skal nakað broytast á hesum stað, mugu vit umrøða tað neyvari. Byggisamtyktirnar fyri gamla býarpartin - og aðrar partar við - mugu umhugsast væl, so vit fáa ein bý, sum partvíst varðveitir nakað av tí gamla og tann hugna, sum fylgir við tí, og sum eisini gevur rúmd fyri menning, framburði og arkitektoniskari nýskapan. Nakað, vit hava sæð alt ov lítið seinastu árini.

Prísurin fyri húsini hjá Anton Degn er høgur - alt ov høgur. Men betri er at brúka henda peningin nú enn angra tað seinri. Samstundis eigur hetta málið at verða eitt lærudømi um, at kommunali myndugleikin eisini kann ”sova´í tímanum”. Tá undanfarni eigarin fekk stuðul frá býráðnum at umvæla húsini, so tað var í samljóð við upprunahúsini, átti kommunan sjálvandi at lýst ein klausul á ognina - so hon ikki kundi takast niður og annað byggjast á staðnum.

Eini 4000 fólk skrivaðu undir eitt mótmæli at taka húsini hjá Degn niður og byggja ein skrivstovubygning har í fimm hæddum. Avgerði hjá meirilutanum í fíggjarnevndini skuldi verið í samljóð við hetta ynski borgaranna! Hetta ynskið eigur býráðið attaka til eftirtektar og samstundis broyta byggisamtyktina fyri økið, so slíkt ikki endurtekur seg.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mannminkandi og rasistiskur úlendingapolitikkur

**Kári Thomsen**



Málið um Rajko og Sladianu Petrovic kann saman við fleiri málum av sama slag enda við at føroyingar verða útvístir í teim londum, teir í løtuni uppihalda seg í.

Hetta er greiða niðurstøðan, ið danskur advokatur ávarar um. Arbeiðsloysi finnist í øllum heimsins londum og kann grundgeving landsstýrisins, at fyri hvønn arbeiðsleysan føroying skal ein útlendingur útvísast, verða sera vandamikil leið.

Hetta er einfalt útlendinga- og arbeiðspolitikkur á allar lægsta stigi, ið einans vil stuðla undir fremmandagerð, rasismu og hatur tjóðum og fólkasløgum millum.

Fiskavirki okkara mangla arbeiðsmegi og fáa ikki fatur á fólki frá Arbeiðloysiskipanini, eisini sjálvt um fólk eru skrásett arbeiðsleys. Fiskaarbeiðið er ikki so áhugavert fyri ungdóm og yngri fólk, og størri og størri partur fær sær útbúgvingar innan onnur øki. Støðan í Íslandi vísir okkum, hvussu gongdin er har innan fiskiídnaðin, og áttu vit at tikið við læru av teirra royndum.

Spurningur kann setast, um útlendingapolitikkur landsstýrisins lýkur vanligum mannarættindum. Kemur eitt land í búskaparligt óføri við vaksandi arbeiðsloysi, er sera ivasamt um útlendingar, ið t. d. hava búleikast í 5 til 10 ár í einum landi, kunnu tveitast út við slíkari grundgeving. Verða hesi menniskju tá ikki fyri órætti og viðfarin sum borgarar uttan egið land? Dømini eru um fólkasløg, ið rikin eru úr egnum landi og í fleiri ættarlið hava livað upp á náði í øðrum londum. Er hetta tað føroyska tjóðin skal taka til sín sum meginregla?

Danskur advokatur hevur boðið sær at taka føroysku útlendingamálini upp til viðgerðar og kanna um útlendingapolitikkur landsstýrisins lýkur vanlig mannarættindi. Er ikki so, kann landsstýrið rokna við at verða stevnt fyri dómstólin í Haag.

Onnur fylgja kann blíva, at føroyingar uttanlands kunnu rokna við at verða útvístir - tí arbeiðsloysi er í ávísum landi, og at útlendingar (føroyingar) ikki kunnu seta seg á teirra arbeiði.

Til at standa ímóti tí ágangi, landsins leiðsla vísir mótvegis støkum útlendingum og útlendskum familjum, kann verða gott hugskot at seta á stovn útlendingafelag, ið miðvíst kann stuðla undir og fylgja einstøku málunum.

# Harri Jústinus Leivsson Edesgaard

**Hjørdis Djurhuus**



Tað er ikki nógv, eg taki til pennin, men eg fari tó her at gera eitt undantak, tí tá ið tygum á blaðsíðu 316 í bók tygara, Kaj 2, siga frá um mann mín, Hákun Djurhuus, sum nú hevur ligið undir mold í 18 ár, at hann á lívsleið síni skal hava fingið sær annað eftirnavn enn tað, hann fekk við dópinum, so er hetta ikki rætt, og vil eg ikki, at tað skal standa óátalað.

Maður mín varð føddur í Havn tann 1. desember 1908, og er hann tann 11. januar 1909 borin til dópin í Havnar kirkju og doyptur Håkon Djurhuus, soleiðis sum niðanfyri standandi fotoavrit av dópsváttanini vísir.

At tað, sum Jákup Dahl, sóknarprestur skrivar í dópsváttan síni frá 6. oktober 1921, er í samsvar við tað, sum stendur skrivað í kirkjubókini, kunnu tygum fáa váttað við at ómaka tygum oman á kirkjukontórið hjá Havnar Kirkju, har opið er týsdag til fríggjadag millum kl 16.30 – 18, sum telefonbókin veeit at upplýsa.

Tygum kalla bókaverk tygara ein dokumentarisk ævisøga. Hetta fari eg ikki at taka støðu til, bert er at vóna, at ikki ov nógvir feilir av sama slag hava sníkt seg inn í hetta annars snotiliga bókaverk.



**Daabsattest**

for Håkon Djurhuus.

| | |
|---|---|
| Fødeby og Sogn ........................ | Thorshavn By og Sogn. |
| Fødselsaar og -Dag ........................ | 1908; 11 December. |
| Kirken, hvori Barnet er døbt eller fremstillet efter Hjemmedaab ........................ | Thorshavns Kirke. |
| Daabsaar og Daabsdag samt — hvis Barnet er hjemmedøbt — Aar og Dag for Fremstillingen i Kirken ........................ | 1909; 11 Januar. |
| Forældrenes fulde Navn og Stilling ........ | [illegible] |

Overensstemmelsen med Ministerialbogen bevidnes.

Thorshavn den 6 Okt. 1921.

J. Dahl
Sognepræst.

Nr. 56. Olaf O. Barfod & Co.s Forlag. Statens kontr. Papir. Stofkl. I. Styrkekl. II.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.